

Íbúðin á Heimasta Horni kann avgjørt blíva eitt verandi stað í nógv ár framyvir, halda tey bæði, Heri og Ann, sum júst eru flutt inn í nýggju íbúðina saman við synunum



Íbúðarbyggingin við Velbastaðvegin í Havn er tann størsta verkætlan av sínum slag í Føroyum

## Nýtt íbúðarmynstur

**At byggja ella keypa hús er ikki einasti møguleikin longur hjá føroyskum familjum at fáa føtur undir egið borð. Seinnu árini eru byggifyritøkur í alsamt størri mun farnar at undir at byggja íbúðarbygningar, har fólk hava høvið at keypa sær eina eigaraíbúð.**

**Stutt fyri jól var største íbúðarbyggingin av hesum slag í Føroyum tikin í nýtslu. Bygningarnir liggja við Velbastaðvegin og fevnir øll byggiætlanin um um átta bygningar við 12 íbúðum í hvørjum í trimum ymsum støddum. Við serliga breiðum hurðum og lyftu í hvørjum bygningi, er eisini lagaligt hjá fólki í koyristóli at koma fram.**

**Bygningarnir eru viðlíkahaldsfríir, meðan eigarafelagið hevur ábyrgdina av felagsøkjunum uttanfyri, so sum spæliplássi og líkn.**
**Sambært tíðarætlanini verða allir átta bygningarnir við teimum í alt 96 íbúðunum tiknir í nýtslu við árslok í ár.**

kunna ganga runt um míni egnu hús, staðfestir Heri.

So við og við gjørdist tankin um at keypa eina eigaraíbúð ikki bara lokkandi, men mest sum eyðsýndur fyri Hera og Ann.

- Ikki tí, vit høvdu tað frálíkt, har vit búðu saman við verforeldrunum á Norðasta Horni, men fyrr ella seinni vil man jú hava sítt egna. Tá møguleikin so beyðst at keypa eina spildurnýggja íbúð í sama øki, var lítið at ivast í longur, sigur Heri, sum stutt fyri jól tískil kundi seta føtur undir egið borð á triðju hædd fyri 1,7 milliónir.

### Grannarnir á Heimasta Horni

Eitt frálíkt grannalag, vøkur náttúra og eitt útsýni, tey flestu munnu øvunda teimum, eru nú karmar um nýggja heimið hjá Hera, Ann og synunum Andrew og Hørður. Úr stovuvindeyganum síggja tey út yvir Nólsoynna, út á Argir og yvir á Velbastaðháls. Beint omanfyri bygningin er hagin, og stutt er inn til býin. Og nú, fólk eru flutt inn í flestu íbúðirnar í bygningi eitt, er eitt serligt huglag við at breiða seg í grannalagnum.

- Her búgva fólk í øllum aldri – frá heilt ungum familjum við smáum børnum til eldri pensjónistar. Enn er alt so nýtt, men tey tykjast øll sera vinarlig og blíð, so tað verður nokk ikki leingi, til eg fari á gátt hjá onkrum at lána ein kopp av sukri, sigur Heri, sum kennir seg sera hepnan at vera partur av hugnaligа grannlagnum.

Hóast grannarnir enn ikki kennast so væl, er tey longu samd um, hvussu gøtan, tey búgva á, skal eita

- Vit fara at heita á kommununa um at kalla gøtuna Heimasta Horn, sum hetta økið jú kallast frammanundan, sigur Heri, sum saman við dámuni, synunum, dóttrini Karin og verforeldrunum fekk eina sera hugnaliga byrjan í heiminum á Heimasta Horni, har tey øll hildu jól saman.



Andrew og Hørður hava fingið sítt egna kamar, har gott pláss er at spæla og fyri nógvum leikum



Familjan stórtrívist í nýggju íbúðini. Her eru tað Ann, Andrew og Hørður sum hugna sær í køkinum